Neistin-KÍF 27-29 (14-14):

# KÍF einsamalt á bronsuplássinum

**Neistin var aftur sær sjálvum líkt, tá teir í einum rótutum dysti vóru við undirlutan móti kollfirðingum, sum nú tykjast stevna móti heiðursmerkjum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fagnaðurin var ovurstórur á kollfirðingum, tá tað eftir teir 60 minuttirnar mikukvøldið var greitt, at teir enn einaferð høvdu vunnið sær tvey stig.

Sigurin lyfti nevnliga KÍF leyst av bæði StÍF og H71 í stríðnum um bronsukrónurnar, og tað er ein støða, sum á ongan hátt hevur verið gerandiskostur í Kollafirði seinnu árini.



*Við sigrinum á Neistanum er KÍF nú einsamalt á triðaplássinum*
*mynd: Álvur Haraldsen*

## Rót og gott málmansspæl

Dysturin sjálvur var tó ein av teimum, sum ikki fara at standa so øgiliga leingi í minninum á áskoðarum. Frá fyrsta bríksli var sjónligt, at talan í ógvuliga lítlan mun skuldi gerast um nakað skipað álopsspæl,og heldur ikki í verjupartinum høvdu liðini sín besta dag.

Kollfirðingar sær sjálvum so líkt, royndu annars fyrst og fremst at leggja dentin á eina offensiva verju, sum var ætlað at steðga skjúttunum hjá Neistanum. Hetta eydnaðist eisini í stóran mun, tí hóast Damir, Buha og Áki fingu nøkur mál, so megnaðu teir ikki at gera sær dælt av plássinum, sum teir sjálvir skaptu fyri mótleikararnar. Heldur royndu teir ein og ein at koma fram til skoringar, og hóast einstakar fríspælingar eisini vóru á skránni, so vóru hesar ov fáar til veruliga at gera ein mun.

Hjá KÍF var ferðin avgerandi. Liðið er samansett av leikarum, sum hvør í sínum lagi er til reiðar at geva seg 100% í hvørjum einasta dysti, og aftur hesaferð runnu teir sólina svarta í royndini at basa mótstøðuni. Samstundis hevur liðið í Regin Petersen og Mirko Milenkvic tveir leikarar, sum – hóast teir kundu stýrt meira – kunnu bróta mótstøðuverjuna við óvæntaðum trekkum, og serliga fyri steðgin eydnaðist hetta nakrar ferðir.

## Silvurið nærkast

Eftir steðgin gjørdist skynsemið í spælinum tó alsamt minni. Verjurnar vóru til tíðir sum opnahjallar, og var tað ikki fyri framúr málverjaavrik í báðum endum, so kundi talan væl verið um ein dyst, har bæði liðini høvdu um 40 mál hvør.

Tað eydnaðist tó spakuliga kollfirðingunum at skapa sær ein fyrimun. Fyrst og fremst tí teir vildu hetta meira enn Neistin.Til tíðir líktist framrættaða verjan eini skuggaverju av øllum trimum bakspælarunum hjá Neistanum, uttan at teir bláu tó megnaðu at gera sær dælt av plássinum, sum hetta gav.

Tíggju minuttir fyri tíð vóru eisini tekin um, at nú var avgjørt, men við einum altíð kempandi Ólavi Brimnes á odda var tó um reppið, at Neistin kom aftur í dystin.

Tvær ferðir hevði Neistin eisini møguleika at koma upp á javnt. Men fyrru ferðina tók Jaspur Joensen brotskastið frá Oros, og í seinna førinum framdi Óla Cristian eina av sínum í minsta lagi tíggju stórbjargingum. Teimum hevði Zeljko Jotic eisini nógvar av, men hann megnaði einki at gera, tá Jóan Pauli Joensen eftirfylgjandi økti í 29-27, og so var sloppið hjá KÍF. Teir kundu enn einaferð fegnast um tvey stig, og nú eru hesi vorðin ellivu ítali. Tað er tvey fleiri enn H71 og StÍF og fjórða plássinum, og bara eitt minni enn Kyndil á øðrum plássi!

### Fakta um dystin

**Neistin-KÍF 27-29 (14-14)**
**Málskjúttar**
**Neistin:** Blagoje Buha 8(1), Ólavur Brimnes 6, Damir Oros 4, Áki Mørk 3, Helgi Michelsen 2, Róar Dalsgarð 2, Tróndur Kragesteen 2
**KÍF:** Regin Petersen 7(3), Jóan Pauli Olsen 6, Arnbjørn Hansen 4, Gert Joensen 3, Røgvi Weihe 3, Petur Martin Poulsen 3, Eddie H. Joensen 2(1), Mirko Milenkvic 1
**Brotskøst:** Neistin 3, KÍF 5
**Útvísingar:** Neistin 3, KÍF 3
**Dómarar:** Andreas F. Hansen & Eyðun Samuelsen. Høvdu eina trupla uppgávu, har teir í væl kundu lagt eina harðari linju.

# Johan í Hamburg og Spania

**Samstundis sum teir, ið verða roknaðir at vera framtíðin á landsliðnum, vera í La Manga, fara Johan B. Hansen og liðfelagarnir at vera í Cadiz**

ÚTISETAR
*Jóannes Hansen*

Í morgin verður farð undir venjingarleguna, sum FSF skipar fyri í La Manga í Spania. Eingir útisetar í Danmark vera við í ferðalagnum. Teir eru upptiknir í sínum egnu feløgum.

Fyrireikingarnar til danska fótbóltsárið ganga við fullari ferð. Nógvir venjingardystir eru á skránni, og ikki minst í Horsens leggja teir nógv fyri. Føroyski landsliðsspælarin, Johan B. Hansen, og liðfelagarnir hava nógv at verja. Horsens er oddalið í næstbestu deildini, og hesa ferð ætla teir sær at halda tørn um tann sessin. Horsens var eisini oddalið fyri einum ári síðani, men tá megnaðu teir ikki at halda tørn um uppflytingarsessin, tá ið kappingin var komin inn í endaspurtin.

Síðsta leygardag var Horsens í Hamburg. Teir spældu ímóti næstbesta liðnum hjá HSV. Sambært heimasíðuni hjá Horsens, so sást tað væl, at týskararnir vóru komnir longri í fyrireikingunum til seinna partin av kappingarárinum, enn danskararnir vóru komnir. HSV vann 2-0, men tað var ikki fyrrenn heilt stutt undan leikloki, at teir staðfestu sigurin, eftir at teir í 1. hálvleiki høvdu lagt seg á odda.

Johan B. Hansen var á vøllinum allar 90 minuttirnar. Hann var í høgra verjuborði. Í dag fara teir í Horsens til Spania á venjingarlegu. Har skulu teir vera í eina viku, og teir skulu halda til í Cadiz. Mánadagin skulu teir spæla venjingardyst ímóti Randers, sum teir í fjør kappaðust við um uppflyting. Randers er nú í superliguni, og í vár skulu teir stríðast fyri at varðveita tað plássið.

## Andrew vann á Skytte

Síðsta leygardag vann Fremad Amager við Andrew av Fløtum á liðnum á heimavølli venjingardyst 3-1 ímóti Kalundborg. Tað serliga við Kalundborg er, at fyrrverandi B68 og HB venjarin og fyrrverandi venjarin hjá næstbesta Fremad Amager liðnum, Frank Skytte, nú hevur ábyrgdina av Kalundborg.

Andrew av Fløtum syrgdi við innleggi úr vinstru fyri upplegginum til fyrsta málið. Tá var eitt stórt korter farið.

Ein av álopsfeløgunum hjá Andrew av Fløtum í Fremad Amager eitur Thomas Myssing. Í síðstu viku varð hann knæskaddur. Nú er staðfest, at hann hevur slitið krossbandið, og tað verður ikki roknað við, at hann verður førur fyri at spæla fótbólt næstu 8-10 mánaðirnar.

Frem við Jón Róa Jacobsen og Jónas Þór Næs í hópinum spældi síðsta leygardag venjingardyst ímóti Lyngby við Christiani Lamhauge Holst á liðnum. Frem vann 2-1.

**SUNSET KAPPINGIN**
**KVINNUR**

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 2 | 2 - 0 - 0 | 527 | 312 | 215 | 17 |
| 2 Stjørnan | 2 | 2 - 0 - 0 | 406 | 310 | 96 | 17 |
| 3 Neistin | 3 | 1 - 0 - 2 | 465 | 377 | 88 | 12 |
| 4 Søljan | 2 | 2 - 0 - 0 | 429 | 368 | 61 | 12 |
| 5 VÍF | 2 | 1 - 0 - 1 | 372 | 371 | 1 | 7 |
| 6 StÍF | 3 | 1 - 0 - 2 | 389 | 436 | -47 | 7 |
| 7 Kyndil | 3 | 1 - 0 - 2 | 341 | 452 | -111 | 5 |
| 8 Tjaldur | 3 | 0 - 0 - 3 | 264 | 567 | -303 | 0 |

**ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN**
**MENN**

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 6 | 5 - 0 - 1 | 473 | 423 | 50 | 18 |
| 2 Kyndil | 5 | 2 - 0 - 3 | 445 | 370 | 75 | 12 |
| 3 KÍF | 6 | 3 - 1 - 2 | 407 | 433 | -26 | 11 |
| 4 H71 | 6 | 2 - 0 - 4 | 459 | 469 | -10 | 9 |
| 5 StÍF | 5 | 2 - 2 - 1 | 395 | 427 | -32 | 9 |
| 6 Neistin | 6 | 1 - 1 - 4 | 441 | 498 | -57 | 6 |